# Stórur áhugi fyri útbjóðingini

Jan Müller

Á middegi í gjár var freistin at handa umsóknir um loyvi í fyrsta útbjóðingarumfarinum á føroyska landgrunninum úti. Tá hevði Oljumálastýrið móttið 23 umsóknir frá 17 feløgum. Talan er bæði um umsóknir til loyvi við 6 ára og 9 ára leitiskeiðum.

-Eg eri væl nøgdur við talið av umsóknum. Sjálvt um oljufeløgini hava víst føroyska økinum stóran ans tey seinastu árini, er tað altíð ringt at meta um, hvussu nógv feløg fara at søkja, tá talan er um eitt heilt nýtt øki. Tað er ein spennandi tíð, sum nú liggur fyri framman, og mín vón er, at leitivirksemið fer at føra til oljuframleiðslu á føroyska landgrunninum, soleiðis at vit í framtíðini fáa eina nýggja og sterka vinnu øllum samfelagnum at gagni sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum.

Hetta fyrsta loyvisumfarið varð latið upp 17. februar í ár. Økið, sum er boðið út, liggur eystan fyri og í ein landssynning úr Føroyum og er um 14.000 ferkilometrar til støddar. Økið er býtt upp í 56 heilar teigar og 26 partteigar. Umsóknirnar, ið eru komnar inn í hesum umfarinum, fevna um umleið eina helvt av útbjóðaða økinum.

Oljufeløgini, sum hava søkt um leitiloyvi á føroyska landgrunninum, eru: Agip, Amerada Hess, Anadarko, Atlants Kolvetni, BP Amoco, British Gas, Conoco, Dong, Enterprise, Føroya Kolvetni, Marathon, Murphey, Norsk Hydro, Phillips, Statoil, Texaco og Veba.

Oljumálastýrið sigur í tíðindaskrivi, at tað miðar móti at veita loyvini í september í ár.

Sum gitt í seinastuni er heimsins størsta oljufelag Exxon Mobil ikki við. Annars hava bæði Esso og Mobil, tá tey vóru tvey feløg, verið við í kanningunum á føroyska landgrunninum. Onnur oljufeløg, sum hava verið við í kanningunum her seinastu árini, men sum tóku seg aftur, tá latið varð upp fyri økinum, eru Mærsk Olie og Gass, Total Fina Elf og Shell. Harvið er ikki sagt, at tey vilja vera við einaferð í framtíðini. Eitt oljufund á føroyskum øki rættiliga skjótt kann fáa hesi feløg til at umhugsa støðu sína skilur blaðið. Tað er komið eitt sindur óvantað á okkara myndugleikar, at heimsins størsa oljufelag Exxon Mobil ikki er við.

Millum feløgini, sum hava verið við í forkanningunum á Føroyaøkinum, men ikki hava latið umsókn inn, er sum sagt franska oljufelagið Total Fina Elf, sum vegna ósemju um útbjóðingarøkini í Sagabólkinum tók seg úr Føroyaøkinum. Mary Dwyer frá Total sigur, at orsøkin til, at tey hava tikið seg aftur er m.a. tað stóra arbeiði, ið liggur fyri framman fyri at fáa framt samanleggingina av Total Fina við ELF. -Vit hava stórar arbeiðsskráir í hinum pørtunum av Atlantsmótinum. Føroyaøkið er bara ikki so upplagt á hesum sinni. Men vit ynskja føroyingum góða eydnu við hesi fyrstu útbjóðingini sigur Total-kvinnan.




*Føroyski stjórin hjá BP Amoco í Føroyum, Hjarnar Djurhuus her saman við trimum umboðum frá bretska oljurisanum, sum kom við trimum stórum køssum*



*L eitingarstjórin hjá Texaco, Donal Driscoll handar Eyðun Elttør umsókn frá Texaco, Conoco og Murphey. Mynd Jan*

# Føroyar kjarnuøki hjá norska Statoil

Jan Müller

Millum oljufeløgini, sum gjáramorgunin lótu inn umsókn til Oljumálastýrið til at vera við í 1. útbjóðing, var norski oljurisin Statoil. Felagið hevur verið eitt av teimum virknastu feløgunum á Føroyaøkinum, síðani menn av álvara fóru at tosa um møguleikan at finna olju á landgrunninum. Og tað eru skjótt trý ár síðani, at Statoil og partnarar tess í AMG (Atlantic Margin Group) søgdu seg vera tilreiðar at fara undir at bora um okkara leiðir. Men Statoil hevur eins og onnur oljufeløg verið noytt til at búgva seg út við toli orsakað av marknatrætuni.

Í gjár var so seinasti dagur at lata inn umsókn til at fáa lut í teigunum á landgrunninum. Statoil er framvegis operatørur í AMG-bólkinum, sum í dag tó er nakað broyttur. Stóra amerikanska oljufelagið Mobil, sum er lagt saman við Exxon, var leingi við í bólkinum. Eisini oljufelagið Enterprise hevur verið við frá byrjan, og tað er framvegis í bólkinum. Herfyri komu so Phillips og Veba Oil uppí bólkin.

John Inderhaug er kanningarstjóri hjá Statoil og myndar tí bólkin, tá umsókn verður latin Oljumálastýrinum. Hann váttar, at Føroyar eru eitt av kjarnuøkjunum hjá Statoil uttan fyri norska landgrunnin. Onnur kjarnuøki eru Aserbadjan, Venzuela og Vesturafrika. Statoil sær stórar møguleikar á Atlantsmótinum og ætlar sær tí at vera virkið bæði í Írlandi, Bretlandi og Føroyum.

Sjálvur heldur hann, at AMG-bólkurin hevur latið inn eina góða umsókn, sum avgjørt er kappingarfør. Hvat viðvíkur føroyskari luttøku í oljuvinnuni, so váttar John Inderhaug, at teir eru farnir rættiliga langt hesum viðvíkjandi í umsóknini. Teir vilja halda fram við at stuðla og vera við til at menna føroyska undirvísingarpartin í eini komandi oljuvinnu. Eisini vilja teir gera sítt til, at føroyskt vinnulív verður tikið við í menningina av hesi nýggju vinnu.

Nú útbjóðingin er av heldur norski leitingarstjórin, at føroyingar eiga at vera fegnir um undirtøkuna, tí nógv góð oljufeløg eru við.



*Umboð fyri AMG-bólkin við umsóknini, sum eisini fylti nógv. Mynd jan*





*Nevnd og stjórn í Atlants Kolvetni við umsóknini til fyrstu oljuleiting við á føroyska landgrunninum nakrantíð. Fv. Mortan Johannesen, Poul Mohr, Vilhelm Petersen, stjóri, Peter Even Djurhuus, ÓLi Hammer og Kjartanm Hoydal, nevndarformaður. Mynd Jan Müller*

*Tveir av oddamonnunum hjá Amerada Hess, Nick Fairbanks, stjóri fyri Bretland og Atlantsmótið og Richard Hardmann, stjóri fyri altjóða leiting. Aftnan fyri Ben Arabo, føroyski stjórin hjá felagnum. Vit síggja elektronisku útgávuna av umsóknini hjá Amerada Hess, British Gas, Dong og Atlants Kolvetni. Mynd Jan*

*Kjartan Hoydal, nevndarformaður íAtlants Kolvetni:*

# Umsóknin er krúnan á verki

*-Eg loyvi mær at siga, at samtakið Atlants Kolvetni er í, fer at hava eitt tað besta føroyska innihaldið í umsóknini, og vónandi fer hetta at telja tá avgerð um loyvi skal takast sigur Kjartan Hoydal, nevndarformaður. Hann heldur tó ikki, at eitt samtak skal hava fyrimun, bara tí at eitt føroyskt felag er við.*



Jan Müller

-Hetta er ein stórur dagur fyri Føroyar og fyri Atlants Kolvetni. Tað kenst væl at vera við í hesi fyrstu útbjóðingini. Hetta sigur Kjartan Hoydal, nevndarformaður í Atlants Kolvetni, nú The Faroes Partnership-bólkurin lat Oljumálastýrinum umsókn sína til oljuleiting á landgrunninum tíðliga gjáramorgunin.

Kjartan Hoydal vísir á, at Atlants Kolvetni varð stovnað í 1997 við tí miðvísu ætlan at koma sær upp í oljuvinnuna, uttan at man sparlaði burtur allan partapeningin beinanvegin. -Eg haldi tað hevur verið næstan eftir klokkuni higartil. Hetta er so krúnan á einum verki, sum hevur gingið júst sum ætlað.

Og hann heldur fram: -Vit eru í einum sera góðum samtaki og eru vit serliga fegnir um tann partin av umsóknini, sum snýr seg um føroyska luttøku í virkseminum. Har ivist eg ikki í, at vit hava tí sterkastu umsóknina, hóast eg ikki veit, hvat stendur í hinum. Hetta er í hvussu er ein ógvuliga væl umhugsaður partur av umsóknini, so eg eri sera spentur um, hvat myndugleikarnir fara at leggja dent á.

Uppá fyrispurning um oljumyndugleikarnir eiga at favorisera eitt samtak, sum hevur eitt føroyskt felag við sigur Kjartan Hoydal, at tað hevði verið vandamikið, um myndugleikarnir gjørdu tað. Tí talan má vera um eina javnbjóðis kapping. -Men tað vit vóna er, at okkara umsókn hevur eitt føroyskt innihald, sum aðrar ikki hava, og at hetta verður virðismett av myndugleikunum.

Kjartan Hoydal heldur sjálvur, at tað er ein styrki hjá einum oljusamtaki at hava eitt føroyskt felag, sum kann vísa á møguleikar og gongdar leiðir í føroyska samfelagnum, við.

Nevndarformaðurin í Atlants Kolvetni er annars nøgdur um gongdina í øllum oljumálinum. -Føroyingar hava borið seg rætt at við ikki at stara seg blindar uppá oljuna upp á forhond og siga, at hon er til, og at hon skal vera okkara bjarging osfr. Men kanningarnar hava so víst, at tað eru realitetir aftanfyri nógva tosið um oljuna.



*Nevnd og stjórn í hinum føroyska oljufelagnum, Føroya Kolvetni við umsóknini. Her saman við umkboð fyri Oljumálastýrið. Frá v. Teitur Poulsen, Eyðun Elttør, oljumálaráðharri, Graham Stewart, nevndarformaður, Nils Sørensen, stjori og Herálvur Joensen, aðalstóri. Mynd Jens K. Vang*